Vikuskiftis Sosialurin



## Ársaðalfundur

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka

**mánadagin 19. mars 2007 kl. 17.00**

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapin.
4. Uppskot um viðtøkubroytingar.

   a) Uppskot um at broyta orðingina í § 4.1 "*100 krónur*" til "*20 krónur*", soleiðis, at partapeningur bankans verður býttur sundur í partabrøv uppá 20 krónur.

   b) Uppskot um, at afturat verandi orðing í § 8.3: "*Hvørt partabræv gevur eina atkvøðu.*" verður sett soljóðandi nýggj orðing: "*Uttan mun til hvussu stóran part ein partaeigari eigur tilsamans av partapeninginum, kann hann fyri egin partabrøv ella sum fulltrúi fyri aðrar partaeigarar, ikki atkvøða fyri meira enn svarandi til 10 % av partapeninginum tilsamans. Ongar avmarkingar eru fyri fulltrúir til nevndina. Uttan mun til hvussu stóran part teir eiga tilsamans av partapeninginum, kunnu partaeigarar innan fyri somu konsern, soleiðis sum hetta hugtak er ásett í løggávuni, ikki saman atkvøða fyri meira enn svarandi til 10 % av partapeninginum tilsamans.*"

   c) Uppskot um, at § 9.2, stk. 2, viðvíkjandi uppskot um broytingar av viðtøkum bankans og uppskot um sjálvboðna avtøku og fusión, fær soljóðandi uppískoyti "*... og treytað av, at minst 2/3 av partapeninginum er umboðaður á aðalfundinum.*"

   d) Uppskot um soljóðandi nýggja § 9.3: "*Uppskot frá Fíggingargrunninum frá 1992 um broyting av ella fráfalli av quorumkravinum í § 9.2 kunnu samtykkjast við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeningi. Avmarkingarnar í § 8.3 og § 9.2 viðvíkjandi atkvøðu og fulltrú eru í hesum føri ikki galdandi.*" Verandi § 9.3 verður so § 9.4.

   e) Uppskot um at broyta § 10.2 frá at vera soljóðandi: "*Teir aðalfundarvaldu nevndarlimirnir verða valdir fyri 3 ár í senn. Hesir eru 4 í tali. Fer nevndarlimur frá í úrtíð, verður eftirmaðurin valdur fyri tað, sum eftir er av valskeiðnum hjá viðkomandi. Afturval er loyvt, tó kann nýval ella afturval ikki fara fram, um nevndarvalevnið er fylt 67 ár.*" til at verða soljóðandi:"*Aðalfundurin velur eina nevnd við 4-6 limum, sum sita til næsta ársaðalfund. Afturval er loyvt, tó kann nýval ella afturval ikki fara fram, um nevndarvalevnið er fylt 70 ár.*"

5. Val av nevndarlimum.
   Høgni Hansen, sum hevur sitið í nevndini síðani 1998, boðaði um ársskiftið frá, at hann ikki tók við afturvali.

   Jóhannus Egholm Hansen hevur valt at taka seg úr nevndini.

   Fíggingargrunnurin frá 1992 innstillar til aðalfundin, at Jóhan Páll Joensen og Graham Duncan Stewart verða afturvaldir, og at Jens Erik Christensen og Eyðhild Skaalum verða nývaldir limir í nevndini.

6. Val av grannskoðarum.
7. Uppskot frá nevndini:

   Nevndin mælir til, at hon fær heimild til innan endan av mars 2008 at lata bankan ogna sær upp til 10 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst. ella, um partabrøv bankans verða skrásett á einum keypsskála, fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta skrásetta keypskursinum við meira enn 10 pst.

8. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3 í Tórshavn. Eisini liggja fullfíggjaði uppskot um viðtøkubroytingar sambært pkt. 4, a) til e), frammi sum nevnt.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi mikudagin tann 14. mars 2007.

Tórshavn, tann 7. mars 2007.

NEVNDIN

FØROYA BANKI

**Missiónshúsið í Porkeri**
Leygarkvøldið 10. mars kl. 21 verður ungdómsmøti í Missiónshúsinum í Porkeri. Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Evangeliskt møti í Ítróttarhøllini í skúlagarðinum í Trongisvági v/ Tórmund og fleiri**
Fríggjakvøldið 9. mars verður húsmøti hjá Käthe og Sigvald Steinkross.
Leygarkvøldið kl. 20 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti, sangur, Luddi, Herman & Gigga og Julius. Kaffi verður at fáa aftaná møtini.

**Missiónshúsið Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Jacob Poulsen Lopra.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*


FJARSKIFTIS EFTIRLITIÐ
TELECOMMUNICATIONS AUTHORITY

## Nýggjar avbjóðingar?

Fjarskiftiseftirlitið, ið er stovnur saman við Posteftirlitinum, skrivstovuni hjá Kappingarráðnum, Tryggingareftirlitinum og Skráseting Føroya sóknast eftir samskipara til tvørgangandi skrivstovuuppgávur.

**Tín førleiki:**
- skrivstovuútbúgving ella líknandi
- dugir væl føroyskt og danskt, umfram kunnleika til enskt
- góðan kunnleika til EDV

**Tínar uppgávur:**
- journalisering
- ymiskar skrivarauppgávur fyri fulltrúar og stjóra
- post-, teldupost-, og telefonavgreiðsla
- røkja heimasíður
- KT-ábyrgdari
- Standa fyri innkeypi
- samskipa ymiskar innan- og uttanhýsis uppgávur

**Vit bjóða tær:**
- Eitt spennandi og læruríkt starv, sum tú sjálv/ur ert við til at skapa, umframt at vit kunnu bjóða tær góðar skeiðs- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Post- og Fjarskiftiseftirlitið, Kappingarráðið, Tryggingareftirlitið, Skráseting Føroya, Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnmálaráð.

**Umsóknir:**
Hevur starvið tín áhuga, er tú vælkomin at senda umsókn við prógvum, viðmælum o.ø. til:

**Fjarskiftiseftirlitið**
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

ella sum teldubræv til fse@fse.fo

**innan mánadagin 26. mars 2007 klokkan 9:00.**

Upplýsingar um starvið fært tú frá Eydnu M. Mikkelsen á tlf. 35 60 43.

***Fjarskiftiseftirlitið***

Meira fæst at vita um stovnarnar á: www.fse.fo, www.kapping.fo, www.tryggingareftirlit.gov.fo, www.posteftirlit.gov.fo og www.skraseting.fo


**Felagið Tórshavn, gongutúr**
Sunnudagin 11. mars verður gongutúrur: Kaldbaksvøtnini. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir og drekkamunn við. Farið verður av Kunningarstovuni. Tilmelding.

**Heilafelagið**
Skrivstovan er opin hvønn mikudag frá kl. 19-20.
*MBF-húsið kjallarin*
*Inngongd frá Landavegnum*
*Tlf. 321520.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Vikan 19.-23. februar***
***Mánadagin 12. mars***
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi 1
kl. 14-16.30 ***Á Grækarismessu í dag verður Tilhaldið 9 ár. Opið hús fyri almenninginum kl. 14-16.30. Føðingardagin verður nýumvælda 1. hædd tikin í nýtslu. Eldraráðið hevur móttøku í sínum høli á 1. hædd. Skrá: Kl. 14 Vælkomin: Wanja Petersen, leiðari í Tilhaldinum, felagssangur.***
***kl. 14.10 Gestarøðari: Jógvan Ósá, løgreglumaður. Felagssangur. Við flyglið: Knút Olsen. Drekka og lagkøka í kjallaranum og á 1. hædd.***
***Týsdagin 13. mars***
kl. 10-11.30 Sangur, Hanus Joensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Málprát, Jóhan H. W. Poulsen.
***Mikudagin 14. mars***
kl. 10-13.30 Matgerð - Anne G. Harlou
kl. 10-12 Handverk. Vegleiðing er á staðnum.
kl. 14-17 ***Nú verður aftur telduprát í Tilhaldinum. Telduprátið verður skipað saman við teimum telduáhugaðu og Páll Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.***
kl. 15 »***Likamsrørsla er av alstórum týdningi fyri at betra um fólkaheilsuna« (AHR). Njóti hetta saman við okkum. Vit ganga. Møtið stundisliga. Øll eru hjartaliga vælkomin.*** Randi/ Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagin 15. mars***
kl. 10-10.30 Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 ***Lesibólkur*** - Bergljót Madsen (Hvønn 1. hósdag í hvørjum mánaði.)
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum - Alma Poulsen
***Fríggjadagin 16. mars***
kl. 10-13.30 Matgerð - Anne G. Harlou
kl. 12 Døgurði
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394. LP@email.fo

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18.00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv. Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
er opið týsdag til hósdag, kl. 15-18.
***Týsdag*** ymisk spøl.
***Mikudag*** ítriv v/ Rigmor.
***Hósdag*** fimleikur v/ Áshild.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Skrá vika 10 og 11***
***Mánadagur:***
Fimleikur
***Týsdagur:***
Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
***Mikudagur:***
Opið hús.
***Hósdagur:***
Myndaveving v. Gretu Olsen.
***Fríggjadagur:***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum.**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá kl.15-18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag
kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag
kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00. Vit koma saman til hugnaløtu týskvøldið 13. mars k. 19.30. Øll eru vælkomin.